# Felagið Føroysk Verkætlanarleiðsla leggur lunnar

FØROYSK VERKÆTLANARLEIÐSLA

Felagið Føroysk Verkætlanarleiðsla (FVL) hevur nú skipað nevnd og er farið undir at gera virkisætlan fyri tiltøk, ið felagið ætlar at fyriskipa í summar og í heyst.

Ætlanin er m.a. at skipa fyri vitjanarferðum til nakrar av teimum verkætlanunum sum eru í gongd í Føroyum í løtuni og fáa frágreiðing um hesar, her dentur verður lagdur á leiðsluliga partin av verkætlanini. Endamál við hesum vitjanum er at víðka kunnleikan um hugtakið verkætlanarleiðslu. Vónin er eisini at tílík tiltøk kunnu menna eitt kontaktnet millum limirnar, soleiðis at teir kunnu heysta av royndum hjá hvørjum øðrum og harvið mennast. Ætlanin er at hava fyrsta tiltakið áðrenn summarfrítíðina.

Felagið er økisfelag undir danska felagnum Dansk Projektledelse (DPL), og er ætlanin hjá føroyska felagnum eisini at kunna um tiltøk, sum limir kunnu luttaka í uttanlands, umframt at kunna um møguleikan at gerast IPMA-sertifiseraður, sum alttjóða viðurkendur verkætlanarleiðari; eitt samstarv, ið DPL hevur við altjóða felagsskapin IPMA (International Project Management Association).

Hósdagin 30. juni kl. 15-17 verður ein virkisvitjan hjá Heilsumálaráðnum, har kunna verður um nýggju THS skipanina, sum millun annað inniheldur teldutøkar sjúklinga journalur v.m. Ætlanin er næstu árini at innføra hesa skipan í øllum heilsuverkinum.

Tey, ið hava áhuga í at vera við á virkisvitjanin skulu boða frá á fvl@post.olivant.fo

Tey, ið hava áhuga í at gerast limir í felagnum kunnu seta seg í samband við felagið á fvl@post.olivant.fo

Kostnaðurin fyri limaskap er: Fyritøkur, íroknað 5 pers.: 5.000 kr./ár, síðani: 600 kr./pers/ár. Persónar: 1.100 kr./ár Lesandi: 300 kr./ár.

# Nósabarnaprix 2005 tíðindi

NÓSABARNAPRIX 2005

Triðja og seinasta undanumfarið av Nósabarnaprix 2005 var fríggjakvøldið 24/6 í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og teir síðstu luttakararnir sum skulu á pallin í tí stóru finaluna á varmakeldu tann 2.juli eru fundnir.

Nummar eitt av triðja undanumfarið gjørdist Birgit K. Eliasen við sanginum "When you believe" og nummar tvey bleiv Hjørdis Nesá við sanginum "Du er den som jeg vil ha´".

Nú eru som nevnt øll undanumførini av, og luttakararnir sum eru komnir víðari fara stundisliga og dúgliga at venja tey nýggju føroysku løgini sum eru gjørd til finaluna og eina nýggja barnafløgu sum eftir ætlan kemur út áðrenn Ólavsøku.

Tað sum vit kunnu avdúka um fløguna er, at her er talan um eina sera øðrvísi barnafløgu-útgávu, har góðar kreftir innan tónasmið hava lagt orku í at fáa so dygdargóða sum til ber.

Finalukvøldið verður eisini okkurt annað gott á skránni. Tá koma tey bæði Angela og Hannibal á vitjan. Tey fara at hava framførðslu í steðgunum.

Finalu-luttakararnir eru: Birgit K. Eliasen, Hjørdis Nesá, Marita Thomsen, Oddvør E. Dam, Jónvør Niklasen og Jón á Steig.

Fyrireikararnir vilja takka høvuðsstuðlinum Føroya Banki, og øllum teimum børnunum sum hava luttikið í Nósabarnaprix 2005. Vónandi fáa vit eina góða og spennandi finalu í Mentanarhúsinum í Fuglafirði á varmakeldu tann 2. juli.




## Kredittráðgevi til peningastovn í vøkstri

Kredittdeild okkara sóknast eftir einum nýggjum kredittráðgeva til eitt avbjóðandi starv í einum peningastovni við hugsjónum og málum innan kredittøkið.

Kredittdeildin hevur ábyrgdina av, at kredittøkið í Sparikassanum verður umsitið forsvarligt og lønandi.

Vit ynskja okkum ein virknan og fakliga tryggan starvsfelaga, ið bæði megnar at arbeiða sjálvstøðugt og í tøttum samstarvi við onnur á kredittdeildini eins og í samtaki Sparikassans.

Føroya Sparikassi stendur í vøkstri, og tí broytast uppgávur, eins og fleiri leggjast afturat. Arbeiðið er fjøltáttað og setur krøv til samstarvshug, samskiftisevni, hugskotsríkidømi og eginleikan at taka avgerðir. Leiðin frá góðum hugskotum til veruleika er stutt.

Uppgávurnar hjá kredittráðgevanum eru t.d.:

- Lánsaksviðgerð
- Uppfylging og gjøgnumgongd av kundaviðurskiftum
- Sundurgreiningar av roknskapum, útlánum og vinnugreinum
- Arbeiði við kredittpolitikki, virkisgongdum og leiðreglum innan kredittøkið
- Áhaldandi menning av kredittøkinum

Nýggi kredittráðgevi okkara eigur at hava hóskandi útbúgving t.d. HA, HD ella líknandi, men fólk við øðrum viðkomandi útbúgvingum eru eisini vælkomin at søkja starvið. Umsøkjarin skal vera sinnaður at menna seg bæði fakliga og persónliga.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til:

Marjuna Eystberg, starvsfólkaleiðara, telefon 348510 ella við telduposti til: marjun.eystberg@sparikassin.fo og/ella Boga Bendtsen, undirstjóra og leiðara á kredittdeildini, telefon 348520 ella við telduposti til: bogi.bendtsen@sparikassin.fo

Skrivlig umsókn skal verða Sparikassanum í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 18. juli 2005.

Send umsóknina til:
FØROYA SPARIKASSI
Att.: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Postboks 34, Yviri við Strond 2
FO-110 Tórshavn

Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Í Sparikassanum starvast 171 fólk á 16 privatkundadeildum og tveimum vinnukundadeildum kring um í landinum. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Á kredittdeildini, Yviri við Strond 2, starvast átta fólk. Í samtaki Sparikassans eru tvey dótturfeløg: Húsameklarafelagið INNI og Eik Bank.

FØROYA SPARIKASSI

Vit søkja sum skjótast:

SPEDITØR (LUFTFRAKT) í TÓRSHAVN

Vit kunnu bjóða:
- sjálvstøðugt arbeiði har høvuðsuppgávan er luftfrakt
- samstarv í einum ungum „toymi“ (team)
- avbjóðingar í einum nýstovnaðum føroyskt/donskum felagið

Vit vænta at tú
- hevur arbeitt sum speditør, helst við luftfrakt
- hevur teldukunnleika og dugir at arbeiða í skipaðum viðurskiftum
- ert tænastusinnaður
- hevur áhuga í at byggja upp nýtt virksemi

Vinarliga send tína umsøkn (senest dato) til:

Eystara Bryggja
P.O.Box 3296
FO-110 Tórshavn
Tel: +298 345960
Fax: +298 345952
E-mail: cargo@smyrilbluewater.com
Att: Heðin Joensen / Rene Dahl Olesen

SMYRIL BLUE WATER

*Smyril Blue Water er eitt nýtt flutnings- og speditiónsfelag stovnað av Smyril Line og Blue Water Shipping. Felagið bjóðar flutningsloysnir við skipi og flogfari til og úr Føroyum, Íslandi, Hetlandi, Vesturnoregi og Europeiska meginlandinum.*